



# Rógvi tók **koyri-kort** í Legolandi

**Níggja ára gamli Rógvi úr Havn, mátti sjálvsagt eisini royna ymisku tilboðini í Legolandi**

**BILLUND**

Alsamt nýggj støð leggjast aftrat stuttleikaparkini, Legolandi í Billund, og tí kunnu nógvir tímar fara aftur um hjá einum føroyskum smádreingi, sum hevur hug at royna seg í leikum í Legolandi. Eitt hitt fyrsta níggju ára gamli Rógvi úr Havn royndi, var Sjórænaralandið, har hann mátti verja seg ímóti álopum frá vatnkanónum, sum vóru festar á økinum kring har sjórænaraskipini sigla. Rógvi slapp rættiliga óskalaður frá skolunum. Eitt hitt mest spennandi fyri Rógva, var tó at sigla inn í loyniholurnar, har ræðuliga nógv dramatiskt er at síggja: - Har var ein stór bjørn, og menn sum skrálaðu. Har var eisini ein maður, sum var vinur við eitt villsvín. Har var eisini ein illur kokkur sum hálaði okkurt úr hárinum hjá einum manni. Har vóru nakrir munkar inn í einari óhugnaligari holu, sum sótu og drukku øl. Har var eisini ein ógvuliga óhugnaligur dreki, ein sá halan hjá drekanum uppiundir loftinum. Eg sá eisini ein gandakall, og nakrar flogmýs uppi undir loftinum, greiddi Rógvi sannførandi frá. Rógvi var eisini fegin um at fáa ein ordiliga spennandi rutsjitúr: - Vit fóru sendandi avstað við einari ræðuligari ferð. Tað var rættiliga óhugnaligt, tí ein fór sendandi avstað við einari so ræðuligari ferð.

**Smáu gráu**

Í Føroyum hevur mangur maður eftirlýst einari koyribreyt fyri tey 18 ára gomlu o.o. sum ætla at taka koyrikort. Ì Legolandi var so væl statt, at tann níggju ára gamli Rógvi kundi taka sítt fyrsta koyrikort. – Minst til at steðga, tá tú kemur til skeltið, sum sigur "Stop". Og tá tað er fríur bana, so kanst tú gott koyra víðari, greiddi koyrilærarin Rógva frá. Rógvi fekk eisini útgreinað, hvar hann ikki mátti koyra inn, og hann fekk eina áminning um, at hann mátti koyra inn í rundkoyringina á høgra bana. Rógvi fekk eitt føroyskt legoflagg á rútin, og so var at koyra avstað, og royna seg. Á koyribreytini vóru bæði donsk, svensk og norsk børn, og tey fingu øll eitt koyrikort, sum eitt gott og stuttligt minni. Legoland er eisini gott fyri tær smáu gráu hjá teimum smáu, tí børnini fáa seg veruliga roynd, og mugu aktivt taka lut í tí sum fer fram. Heldur Legoland framgongdini, so vera eisini mong føroysk børn at síggja har tey næstu 41 árini.











